

Havila Shipping hevur gjørt avtalu við Premier Oil UK um Havila Crusader í minst tvey ár. Mynd Premier Oil

# Havila hevur fingið avtalu fyri enn eitt skip

**Jógvan Hugo Gardar**

28.06.2015 - 13:57

Oljan.fo

Havila Shipping hevur gjørt avtalu við Premier Oil UK um leigu av PSV-skipinum Havila Crusader. Tað boðar Havila frá í einum tíðindaskrivi.

Avtalan er tvey ár til longdar, við møguleika fyri at kunna longjast í eitt ár. Við hesu avtaluni eru øll 14 PSV-skipini hjá Havila í arbeiði í minst eitt ár frá nú av.

Stjórin í Havila Shipping, Njål Sævik, sigur at tey eru nøgd við avtaluna.

- Vit hava seinnu árini roynt at tryggja skipunum langtíðaravtalur. Eg eri tí nøgdur við at vit nú eisini hava tryggjað seinasta av PSV-skipunum, sum var í spotmarknaðinum eina góða og trygga avtalu. Tað er gott at vita at øll PSV-skipini nú hava nokk at gera til einaferð seint í 2016, sigur Sævik.